LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Postboks 3279,
Tinghúsvegur 7
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 23. august 2023
J.Nr.: LUM-16- 23/05988-7
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr. 21/16717

**Viðvíkjandi nágreining av § 3, stk. 2 í dagstovnalógini**

Tann 6. mars 2023 sendi eg Barna- og útbúgvingarmálaráðnum eitt skriv, har eg bað Barna- og útbúgvingarmálaráðið greiða mær frá viðgerðini av § 3, stk. 2 í dagstovnalógini í avgerðini til A, dagfest 13. januar 2023, frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

Ráðið hevur í skrivið, dagfest 24. apríl 2023, greitt frá, tað var av misgáum, at spurningurin um vavið av § 3, stk. 2 í dagstovnalógini ikki var viðgjørdur í svarskrivinum, sum var sent kærara tann 13. januar 2023.

§ 3, stk. 1 og 2 í dagstovnalógini eru soljóðandi:

> "**§ 3.** Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt og hevur ábyrgdina fyri virkseminum. Dagstovnur sambært hesi lóg er vøggustova, barnagarður, frítíðarheim o.a. ...
> *Stk. 2*. Dagstovnar og dagrøktir hava opið gerandisdagar í dagtímunum, men kommunan kann eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini geva loyvi til, at dagstovnar kunnu hava opið alt samdøgrið ella í vikuskiftunum."

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur í skrivinum tann 24. apríl 2023 greitt frá, at dagstovnalógin skal dagførast í næstum, har eisini § 3, stk. 2 skal viðgerast og nágreinast nærri, soleiðis at eingin ivi er um, hvat henda grein inniber fyri avvarðandi at børnunum og eitt nú kommununum.

Ráðið greiðir millum annað soleiðis frá fatan síni av § 3, stk. 2 í dagstovnalógini í mun til frítíðarskúlar/frítíðarheim:

> "Yvirskipað kann sigast, at orsøkin til at frítíðarheim kunnu hava stongt, tá ið skúlarnir eru í feriu, skal síggjast í ljósinum av, at talan er um eitt tilboð til børn, sum ganga í forskúla og til og við 3. flokk, har tey hava møguleika fyri at koma í frítíðarheim eftir skúlatíð, sum vanliga er frá umleið kl. 12.00, tá ið skúlatíðin hjá hesum flokkum er liðug, og til umleið kl. 17.30. Talan er sostatt um eitt tilboð, sum á ein heilt serligan hátt er tengt at skúlanum og skúlagongdini, og tískil verður lagt til grund, at upplating av hesum tilboði eisini eigur at fylgja skúlatíð og upplating.
>
> Viðvíkjandi frítíðarheimum so er hetta sum áður víst á, tengt at skúlavirksemi, og kemur sostatt eisini framyvir at verða tengt at hesum. Væntast kann tískil ikki, at vanliga tilboðið um ansing eftir skúlatíð, tá skúlin hevur stongt, verður ásett í komandi dagføring av dagstovnalógini. Tó er og vil tað altíð vera

> soleiðis, at har hetta tilboð verður bjóðað út, skal tað eisini kunna veitast teimum børnum, sum eru fevnd av § 5, stk. 1, vísandi til meginregluna um líkskap."

Eg haldi, at tá ið frítíðarheim av lóggávuvaldinum eru sett inn í dagstovnalógina, mugu tey metast at vera umfatað av § 3, stk. 2 um, hvussu dagstovnar hava opið, uttan so at serligar ásetingar ella undantøk eru gjørd viðvíkjandi teirra upplatingartíðum.

Um so er, at ásetingin um at hava opið gerandisdagar einans skal umfata skúladagar í mun til frítíðarheim, átti tað at verið ásett greiðari í lógini, at frítíðarheim er nærri tengt at fólkaskúlanum og frídøgunum har. Lógarviðmerkingarnar nevna einki um tað.

Eg eri sostatt ikki samd við Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í tulkingini av orðingini "gerandisdagar" í § 3, stk. 2 í dagstovnalógini, tá tað snýr seg um, nær frítíðarheim o.a. vanliga hava opið.

Vísandi til at dagstovnalógin skal dagførast í næstum, geri eg ikki meira við hetta mál.

Avrit av hesum skrivið verður sent klagaranum A, til kunningar.

Vinarliga

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður